VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag :
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum, um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í hvassan vind av útsynningi og regn ella ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig. Týsdagin stívt andøvsgul av útnyrðingi og ælingur. Kaldari.

Nólsoyar vitin á 20-krónu

Sjeynda 20-krónan í røðini av tárnmyntum varð send í umferð hósdagin. Hesa ferð við Nólsoyarvitanum á Borðutanga sum motivi á baksíðuni

20-KRÓNA
Jákup Mørk

Tað var kanska hóskandi, at tað skuldu verða nólsoyingar, sum fingu nakað av sínum á nýggju 20-krónuna, sum varð send í umfar hósdagin.

Nólsoyingar vóru nevnliga teir fyrstu, sum mistu sítt motiv á pengaseðlunum, tá 50 krónu-seðilin við Nólsoyar Páll og bygdini annars varð skiftur út.

Nú hava nólsoyingar so fingið vitan á Borðutanga á nýggja 20-krónu. Hesin mynturin er partur av sonevndu »tårnmønt« røðini, sum Tjóðbankin hevur latið gjørt. 20-krónan við Nólsoyar vita er tann sjeynda í røðini av hesum, og hvør teirra er prentað í 1.200.000 eintøkum.

Enn sum áður er tað Margretja Drotning, sum er avmyndað á forsíðuni á krónuni.

Føroyskur listamaður

Tað er Hans Pauli Olsen, sum hevur sniðgivið baksíðuni á nýggju 20-krónuni, og er hetta ikki fyrsta ferðin, at Hans Pauli prýðir myndir hjá Tjóðbankanum. Ein av hinum 20-krónunum í tárn-røðini er nevnliga at torninum á Christiansborgs slotstårn, og hesa myndina hevur Hans Pauli Olsen eisini gjørt. Somuleiðis var tað Hans Pauli, sum gjørdi myndina á eini av 10-krónunum, sum eru ognaðar ævintýrunum hjá H.C. Andersen. Nevnliga myndina av ljóta dunnuunganum, sum varð givin út í fjør.

Soleiðis sær nýggja 20-krónan út. Hon er sjeynda í røðini av sonevndu tárn-myntum

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	3
Nuuk	7
Qaqortoq	5
Ammassalik	6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	9
Lerwick	10
Aberdeen	16
London	20
Tromsø	6
Bergen	10
Oslo	--
Stokkhólm	15
Keypmannah.	16
Helsinki	12
Moskva	17
Berlin	19
Warzawa	21
Kiev	20
Bukarest	20
Paris	23
Madrid	26
Róm	25
Malorca	25
Athen	26
Malta	27
Tunis	27
Beijing	21
New Dehli	27
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	23
New York	28
Miami	30
Los Angeles	20
Meksikobýur	20
Panama	--
La Paz	4
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	11

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt hátrýst, 1030 hPa. yvir Atlantshavinum stendur mestsum í stað og mennist. Ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum fríggjadagin.

Í dag:
Eitt lágtrýst, 1006 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarmorgunin.

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 14/9 kl. 06⁰⁰– 15/9. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 14/9 kl. 06⁰⁰– 15/9 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 24,4 mm

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

11. september Fyrra kvarter
16. september Mánin næstur jørðini
18. september Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
16. Sept	05.48	18.11	04.48	17.11	05.03	17.26	07.48	20.11	08.48	21.11	04.03	16.26	03.03	15.26	06.03	18.26	07.03	19.26	05.33	17.56	06.48	19.11
17. Sept	06.35	19.00	05.35	18.00	05.50	18.15	08.35	21.00	09.35	22.00	04.50	17.15	03.50	16.15	06.50	19.15	07.50	20.15	06.20	18.45	07.35	20.00
18. Sept	07.25	19.48	06.25	18.48	06.40	19.03	09.25	21.48	10.25	22.48	05.40	18.03	04.40	17.03	07.40	20.03	08.40	21.03	07.10	19.33	08.25	20.48
19. Sept	08.12	20.35	07.12	19.35	07.27	19.50	10.12	22.35	11.12	23.35	06.27	18.50	05.27	17.50	08.27	20.50	09.27	21.50	07.57	20.20	09.12	21.35
20. Sept	08.59	21.23	07.59	20.23	08.14	20.38	10.59	23.23	11.59	-	07.14	19.38	06.14	18.38	09.14	21.38	10.14	22.38	08.44	21.08	09.59	22.23

5 707265 100050 >